gult28 cyan28 magenta28 svart28



# Hósdagur 7. juni

## SVF

18.30 Mús og Múli 3
18.35 Jumanji 19
19.00 Stuttligar lýsingar
19.10 Á ferð inn í ein nýggjan heim – 9. symfoni eftir Antonin Dvorak
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Bryggjarin 2:12 - donsk røð
21.45 Vald andanna 1:2 - donsk dokumentarrøð
22.30 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2
23.20 Liðugt

## Eurosport

7.30 Tennis
8.30 Football
11.00 Sailing
11.30 Car Racing
12.00 Truck Sports
12.30 Xtreme Sports
13.00 Live - Tennis
17.30 Cycling
19.00 Tennis
20.00 Tennis
21.00 Football
22.30 News
22.45 Tennis
0.15 News
0.30 Close

## BBC Prime

0.00 TLZ: »War Walks – Agincourt«
0.30 TLZ: »War Walks – Waterloo«
1.00 TLZ: »Future Fantastic – Starman«
2.00 TLZ: »What have the 60's ever done for us?«
2.10 TLZ: »Background Brief - Frying or Freezing?«
2.30 TLZ: »The Crunch – Discomfort Zone«
3.00 TLZ: »Plugging into the Sun«
3.30 TLZ: »Acid Rain«
4.00 TLZ: »Computing for the Terrified – Cross Words«
4.40 TLZ: »Megamaths – Division - Divide by Two«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – Introductions«
5.30 TLZ: »English Zone«
6.00 Noddy: »Noddy Cheers Up Big Ears«
6.10 Angelmouse
6.15 Playdays
6.35 Clever Creatures
7.00 The Really Wild Show: »Wildest Hits«
7.30 Ready, Steady, Cook
8.15 Style Challenge: »Butlers«
8.40 Real Rooms
9.05 Going for a Song
9.30 Battersea Dogs' Home
9.50 Antiques Roadshow
10.20 TLZ: »Natural Design – Robocritters«
11.20 Garden Stories: »Partnership«
11.50 Ready, Steady, Cook
12.35 Style Challenge
13.00 Doctors: »Whose Fault Is it Anyway?«
13.30 EastEnders
14.00 Real Rooms
14.30 Going for a Song
15.00 Noddy: »Noddy Cheers Up Big Ears«
15.10 Angelmouse
15.15 Playdays
15.35 Clever Creatures
16.00 The Really Wild Show: »Wildest Hits«
16.30 Top of the Pops Eurochart
17.00 Changing Rooms: »Ireland«
17.30 Doctors: »Chapter of Accidents«
18.00 EastEnders
18.30 Barking Mad
19.00 Are you being served?: »Friends and Neighbours«
19.30 Next of Kin
20.00 Casualty: »Allied Forces«
21.00 Goodness Gracious Me
21.30 Top of the Pops Eurochart
22.00 The Beggar Bride
23.30 Dr. Who: »Terminus«

## BBC World

0.00 BBC News
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News
2.30 Reporters (r)
3.00 BBC News
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News
4.30 HARDtalk (r)
5.00 BBC News
5.30 Top Gear (r)
6.00 BBC News
6.30 Reporters (r)
7.00 BBC News
7.30 HARDtalk
8.00 BBC News
8.30 Talking Movies (r)
9.00 BBC News
9.30 Simpson's World (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Holiday (r)
12.00 BBC News
12.30 Simpson's World (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.30 Simpson's World (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
21.55 Vote 2001: The UK Election

## TV3

5.00 Børne-hjørnet med Disney
7.00 Garfield og venner
7.30 TV-shop
8.20 Hvide Løgne
8.45 Ricki Lake
9.40 Træneren
10.10 Horton-sagaen
11.00 Horton-sagaen
11.50 Panter-tanter
12.20 Vild med dig
12.50 Melrose Place - classic
13.45 Ricki Lake
14.35 Pæn pige - sej sild
15.00 Min kære familie
15.30 Baywatch
16.25 Ricki Lake
17.25 Sportsnyhederne
17.30 Sabrina - skolens heks
18.00 Susan - sød og single
18.30 Hvide Løgne
19.00 GRISK – når det gælder
20.00 Far på flugt
21.45 Heksene fra Warren Manor
22.40 Vore værste år
23.10 Simpsons
23.40 Ti tommelfingre
0.10 Monty Pythons flyvende cirkus
0.50 Kojak
1.50 Caroline, karrieren og kærligheden
2.20 Vore værste år
2.50 Monty Pythons flyvende cirkus
3.40 Sunset Beach
4.25 Godnat

## ÚF

7.00 Tíðindi
7.05 Morgunlestur - Jóhanna Vesturdal á Eiði lesur
7.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
7.30 Tíðindi
7.35 Morguntónleikur
8.00 Tíðindi
8.03 Morgunrásin
9.00 Tíðindi
9.50 Morgunlestur (e) - Jóhanna Vesturdal á Eiði lesur
10.00 Tíðindi
10.05 Fyrrapartsløg - Kim Hansen velur løgini
11.00 Tíðindi
11.03 Koparskrínið (e) - Dánjal Joensen lesur 3. part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.50 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin - Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Kári Annand Berg
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum - Victor Carlsen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Hetjur í Skriftini - Jesaja tann kollveltingarsinnaði kongurin. Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar - Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum - Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Dagsetur - Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Tíðindi

## Hetjur í Skriftini

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Jesaja var síðsti, stóri kongurin í Juda ríkinum. Landið dyrkaði heidnar avgudar og alt var farið í forfall. Fólkið var í andaligum myrkri og hevði gloymt alt um sínar røtur. Jesaja setir sær fyri at reinsa landið og rudda alt tað heidna burtur og tað er, meðan tey endurreisa Templið at tey finna 5 Mósebók og tá kemur vend í.

## »Á ferð inn í ein nýggjan heim«

**SVF Hóskvøldið kl. 19.10**

– 9. symfoni eftir Antonin Dvorak. (e)
Tónleikaverkið »Á ferð inn í ein nýggjan heim« er eitt tað kendasta tónleikaverkið yvirhøvur. Fyri kekkiska tónaskaldið Antonin Dvorak gjørdist hendan 9. symfoniin hæddarpunktið í einum drúgvum skapanaravriki innan tónlist, sum bæði umfataði symfoniir, operur, kvartettir og ikki minst teir sonevndu slavisku dansirnar.

9 symfoni eftir Dvorak er ein avbjóðing fyri eitthvørt symfoniorkestur, og í hesari framførsluni síggja vit tað føroyska symfoniorkestrið framføra verkið í Norðurlandahúsinum. Dirigentur er Bernarður Wilkinsson.

## GRISK




## Faðir á flýggjan

Amerikanskur filmur frá 1993

Smásnýtarin Jack Charles (Patrick Swayze) er avgjørt ikki fegin, tá hann verður órógvaður av sínum tveimum børnum, Kelly og Eddie, ið eru tanáringar, sum hann helt vóru langt burtur.

Børnini hava hinvegin onga aðrastaðni at vera , so hóast tað ikki liggur serliga væl fyri, so má hann taka sær av teimum. Jack hevur stórar ætlanir – saman við vini sínum Jerry fer hann at ræna ein stóran peningaflutning frá mafiuni.




## Rás 2

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Léttur tónleikur
11.00 Birgir Beinleiðis - Birgir Sondum við gesti
12.00 Tíðindi & Lýsingar
13.00 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur
14.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarunum
15.00 Tíðindi og lýsingar
15.15 Ynskiløtan (framhald)
16.00 Laila Beinleiðis - Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17.00 Norðlýsið! - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og lýsingar
18.15 Léttur tónleikur
19.00 Orð á leiðini EVR-sending - »Hvat er missión?« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og lýsingar
21.15 Orðið (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo

## Lindin

13.00 Byrjan Dagsskráin ver:ur lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Frá hjarta til hjarta
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð eftri Svenning av lofti
18.05 The Finishing Touch - ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 The Finishing Touch heldur fram
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð (e)
21.00 Bønarlinjan við gesti - Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 - Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana.
Vit gevast uml. middnátt

gult29 cyan29 magenta29 svart29

ítróttur

Nr. 103 • fríggjadagur • 1. juni 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Christian Høgni rennur kapp við tíðina

**Tað er avgjørdur fyrimunur, at landsliðið er á grasvølli, og málskjúttin í Luksemburg heldur einki vera at ivast í, at hann verður førur fyri at spæla í annaðkvøld**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað man kennast eitt sindur undarligt. Christian Høgni Jacobsen varð eftir landsliðsferðina í mars í Luksemburg og Russlandi roknaður sum ein hálv hetja. Hann skoraði annað málið í Luksemburg. Saman við Kurt Mørkøre átti hann hitt málið, og í Russlandi vísti hann gott tev.

Men hóast góðu gongdina á ferðini uttanlands, so var dagurin í gjár tann fyrsti, sum Christian Høgni Jacobsen taldist ímillum teir, sum saman við Allani Simonsen fyrireikaði seg til landsdyst á Svangaskarði.



*– Í sær sjálvum er landsliðið ein dreymur, sum gerst veruleiki. Men eg haldi ikki, at tað ber til at hugsa um møguleikan at verða seldur, meðan landsliðið spælir*

### Betri á grasi

Tær seinastu vikurnar hevur tað verið ivasamt, um Christian Høgni fór at verða tøkur til landsdystirnar. Men tað ivast ungi NSÍ álopsmaðurin ikki í.

– Ein vøddi í lærinum hevur knýtt seg, og tað hevur havt við sær, at tað hevur ikki borið til at spælt. Eg havi fingið viðgerð hvønn dag, og tað tykist sum skaðin er burtur. At landsliðið venur á grasi, er ein stórur fyrimunur. Tær seinastu vikurnar hava vit spælt nógvar dystir, og tað fer illa við beinunum at spæla á graslíki, tí undirlagið er so hart, heldur Christian Høgni Jacobsen, sum tær seinastu vikurnar fyri tað mesta hevur vant einsamallur og ikki saman við liðfeløgunum í NSÍ.

Tá vit bera upp á mál, um hann roknar við at hann fer at verða ímillum teir fyrstu ellivu í annaðkvøld, er ungi maðurin beskeðin:

– Eg haldi, at tað eru aðrir álopsspælarar, sum hava fleiri royndir enn eg. Men um venjarin heldur, at eg skal spæla við, so vóni eg, at tað fer at bera til at liva upp til álitið. Allir átjan vilja sjálvandi spæla við, og allir eru ivaleyst greiðir yvir, at talan verður um stóra avbjóðing, heldur Christian Høgni Jacobsen, sum má roknast vera komin hópin nærri plássi ímillum teir fyrstu ellivu, eftir at Todi Jónsson ikki er á landsliðnum.

### Dreymurin

Christian Høgni Jacobsen hevur í fleiri ár víst gott hegni sum álopsleikari. Hann hevur góðan bóltførleika, hann er skjótur, og hann er málsøkin. Seinni í hesum mánaðinum verður Christian Høgni liðugur við hægri handilsskúlan á Kambsdali, og so ætlar hann at geva fótbóltinum ein møguleika.

Hann veit eitt sindur um, hvat tað snýr seg um. Fyri tveimum árum síðani var hann í eina viku í Portugal og royndarvandi við einum felag í næstbestu deildini, sum eitur Penfield. Hetta er eitt felag, sum FC Porto eigur stóran lut í.

– Tað var spennandi, men tað spurdist einki burturúr. Eg var ikki serliga heitur fyri tí møguleikanum, men tað vil ikki siga tað sama, sum at eg ikki hevði tikið av, um eitt tilboð kom frá einum felag, har umstøðurnar eru væl skipaðar, sigur Christian Høgni Jacobsen, sum ásannar, at hann – sum so mangur annar ungur drongur í Føroyum – hevur havt ein dreingjadreym um at gera fótbóltin til livibreyð.

– Tað tykist sum møguleikin er komin nærri til føroyskar spælarar tey seinastu árini. Vit hava sæð, at fleiri hava staðið seg væl í Danmark, og eg haldi, at tað er sera spennandi at fylgja við í, hvussu tað gongst hjá Súna Olsen í Hollandi.

Hugsar tú um møguleikan fyri at koma til útlendskt felag, tá tú spælir á landsliðnum?

– Í sær sjálvum er landsliðið ein dreymur, sum gerst veruleiki. Men eg haldi ikki, at tað ber til at hugsa um møguleikan at verða seldur, meðan landsliðið spælir. Tað hevði darvað spælinum, heldur Christian Høgni Jacobsen, sum í annaðkvøld fyri fyrstu ferð verður í landsliðshópinum á Svangaskarði, og sum sigur, at hann í fyrstu atløgu er nøgdur við at vera í hópinum, men at hann er klárur, um venjarin heldur, at hann skal á vøllin.

## John er skjótastur

Tá Føroyar løgdu seg á odda í útidystinum móti Sveis, setti John Petersen føroyskt met. Málið hjá John fall eftir trimum minuttum og 27 sekundum, og so skjótt hava Føroyar ongan tíð skorað fyrr. Gamla metið átti Torkil Nielsen, tá Føroyar í 1989 fingu sítt fyrsta aljtóða mál. Málið hjá Torkili móti Canada fall eftir trimum minuttum og 35 sekundum.

Tá Føroyar í 1991 spældu ímóti Danmark í Landskrona, skoraði Kim Christofte eftir bert einum minutti og 10 sekundum, og so skjótt hevur eingin annar skorað móti okkara monnum.

# Stjørnurnar koma

**Fleiri altjóða stjørnur teljast millum fótbóltsleikararnar, sum komandi dagarnar kunnu síggjast í Føroyum**

LANDSLIÐ
*Jákup Mørk*

Landsliðshópurin hjá Sveis kom til Føroya í gjár, og niðanfyri er yvirlit yvir teir leikarar, sum eru við á ferðini. Hóast liðið ikki hevur teir báðar størstu profilarnir á liðnum, Chaupisat og Türkuylmaz, ikki eru tøkir, so er talan kortini um eitt sera sterkt lið.

Millum avgjørdu profilarnar eru Zforza og Vogel, sum spæla við ávíkavist Bayern München og PSV Eindhoven.

### Jugoslavisku stjørnurnar

Tykist sveisiska liðið ikki so øgiliga ræðandi, tá talan er um kend nøvn, so er støðan ein heilt onnur, tá Jugoslavia kemur á vitjan. Eisini her er hópurin úttikin, og er talan um hópin av nøvnum, sum í fleiri ár hava talst millum stóru stjørnurnar í bæði italskum og sponskum fótbólti.

Bara fyri at tríva í onkur av nøvnunum kunnu nevnast Predrag Mijatovic, sum millum annað hevur roynt at skotið avgerandi málið í eini Champions League finalu, og vandamesti frísparksskjúttin í italskum fótbólti, Sinisa Mihajlovic.

### Hópurin hjá Sveis

| Leikari | lið | dystir/mál |
|---|---|---|
| Marco Pascoloi | FC Zürich | 51/0 |
| Jørg Stiel | FC St. Gallen | 2/0 |
| Bruno Berner | Grasshopper Club | 0/0 |
| Stéphane Henchoz | FC Liverpool | 48/0 |
| Giuseppa Mazzarelli | AS Bari | 9/0 |
| Patrick Muller | Olympique Lyonnais | 21/1 |
| Yvan Quentin | FC Zürich | 35/0 |
| Ramon Vega | Celtic Glasgow FC | 23/1 |
| Marc Zellweger | FC St. Gallen | 6/0 |
| Marco Zwysig | FC St. Gallen | 10/1 |
| Ricardo Cabanas | Grasshopper Club | 1/0 |
| Sébastian Fournier | Servette FC | 32/3 |
| Alexander Frei | Servette FC | 3/3 |
| Massimo Lombardo | Lausanne Sports | 9/1 |
| Johan Lonfat | Servette FC | 9/1 |
| Jöel Magnin | FC Lugano | 0/0 |
| Ciriaco Zforza | FC Bayern München | 73/7 |
| Léonard Thurre | Servette FC | 3/0 |
| Johann Vogel | PSV Eindhoven | 42/1 |
| Raphaël Wicky | Atletico Madrid | 32/0 |
| Hakan Yakin | FC Basel | 10/3 |

Venjari: Enzo Trossero

### Hópurin hjá Jugoslavia

| Leikari | lið |
|---|---|
| Sasa Ilic | Charlton Athletic FC |
| Radovan Radakovic | FK Partizan |
| Zarko Lucic | FK Buducnost |
| Zoran Mirkovic | FC Fenerbahce |
| Miroslav Djukic | Valencia FCV |
| Goran Djorovic | Selta de Vigo |
| Sinisa Mihajlovic | S.S. Lazio |
| Goran Bunjevcic | FK Crevena Zvezda |
| Milan Obradovic | FK Obilic |
| Dragoljub Jeremic | FK Partizan |
| Boban Dmitrovic | GAK-Graz |
| Vladimir Jugovic | Internazionale FC |
| Ivan Tomic | CD Alaves |
| Dejan Stankovic | S.S. Lazio |
| Nikola Lazetic | FC Fenerbache |
| Ljubinko Drulovic | FC Porto |
| Ivan Gvozdenovic | FK Partizan |
| Sasa Ilic | FK Partizan |
| Vladimir Ivic | FK Partizan |
| Predrag Mijatovic | Fiorentina FC |
| Savo Milosevic | Parma AC |
| Mateja Kezman | PSV Eindhoven |
| Goran Drulic | FK Crvena Zvezda |

Venjari: Vujatin Boskov